

Arbeiðsbólkurin, ið hevur skrivað álitið fyri Tórshavnar býráð, mælir til, at barnaálitið verður gjørt í neyvum samstarvi við bamaverndarnevndina, somuleiðis sum tað skal líkjast eldraálitinum, ið varð lagt fram fyri nøkrum árum síðani. Mynd: Jens Kr. Vang

# Mæla til at gera barnaálit

*Nýggja mentanarálitið hjá Tórshavnar býráð mælir til, at gjørt verður eitt álit um viðurskifti hjá børnum í kommununi*

John Johannessen

Eitt álit um viðurskifti og mentan hjá børnum og teimum ungu í Tórshavnar kommunu eigur at verða gjørt í næstum.

Hetta er eitt av tilmælunum í nýggja mentanarálitinum, sum fyrradagin varð handað Leivi Hansen, býráðsformanni í Havn.

Arbeiðsbólkurin, ið hevur skrivað álitið, mælir til, at barnaálitið verður gjørt í neyvum samstarvi við barnaverndarnevndina, somuleiðis sum tað skal líkjast eldraálitinum, ið varð lagt fram fyri nøkrum árum síðani.

**Børnini vorðin einsamøll og óvard**

Grundgevingina fyri, at neyðugt er við einum barnaáliti, sigur arbeiðsbólkurin vera, at tær stóru samfelagsbroytingarnar, sum hava verið hetta seinasta ættarliðið tykjast at hava gjørt tey veiku børnini meira einsamøll og óvard. Samfelagsbroytingarnar, bólkurin sipar til, eru í mestan mun broytingar í arbeiðslívi og tøkni.

**Meira samstarv millum skúlar**

Skúlarnir skulu eisini gera eitt størri arbeiði fyri, at børnini kenna seg sum part av eini størri og skapandi eind. Hetta sigur arbeiðsbólkurin í einum øðrum broti í mentanarálitinum, sum snýr seg um skúlasamstarv. Í hesum broti mælir arbeiðsbólkurin til, at skúlarnir á hvørjum ári hava ymisk felags tiltøk. Sum dømi verður møguleiki fyri eini felags stevnu við føroyskum dansi nevndur, somuleiðis sum kórstevna og felags sjónleikarastevna verða nevndar.

Álitið mælir eisini til at ábyrgdarkenslurnar hjá næmingunum fyri nærumhvørvinum verða styrktar. Hetta heldur arbeiðsbólkurin kann gerast við at ársins skúlastova verður vald, og at tann flokkurin, ið eigur skúlastovuna, fær virðisløn ella heiðursbræv afturfyri.

Mentanarálitið hevur ta sannføring, at skúlarnir í høvuðsstaðnum skulu vera annað enn skúlar. Mælt verður til, at roynt verður at hava skúlarnar opnar eftir skúlatíð. Teir skulu nevniliga gerast virkisdeplar í grannalagnum, somuleiðis sum skúlagarðarnir skulu verða virkin og lokkandi spæliøki í býlinginum.


# GSM frá Telebúðunum

## ...so ert tú altíð har, tú skalt vera!



PRÍSUR VIÐ MVG
**Ericsson T10s**
**1990,-**
Fartelefonin til tín, sum fegin vil hava ta nýggjastu tøknina, men sum eisini fegin vil hava eina snøgga bíliga telefon, mann leggur merki til.



PRÍSUR VIÐ MVG
**Ericsson T28s**
**5295,-**
Er ikki bert minsta fartelefonin, ið Ericsson hevur á marknaðinum. Hon er eisini nýskapandi við hópin av hentleikum m.a. vibrator, raddarstýring og profil-funktiónir.



PRÍSUR VIÐ MVG
**Nokia 3210**
**2095,-**
Hóast telefonin er lítil og snøgg, hevur hon ein stóran skíggja við stórari upploysn, sum gevur góðan mótlit og týðiligar bókstavar, ið eru lættir at lesa.



PRÍSUR VIÐ MVG
**Nokia 8210**
**5390,-**
Fartelefonin sum lurtar, tá tú tosar. Tú kanst goyma upp til 8 nøvn, sum tú kanst ringja til og sum verða styrd av røddini hjá tær. Er ein av lættastu telefonunum hjá Nokia.



PRÍSUR VIÐ MVG
**Nokia 8850**
**6795,-**
Uppkøllini kunnu stýrast av røddini hjá tær. Eisini er telefonin skjót at nýta, tá tú skalt skriva tekstboð, tí telefonin minnist, hvørji orð tú fyrr hevur skrivað. Hevur innbygda antennu og góða ljóðgóðsku.



PRÍSUR VIÐ MVG
**Siemens C25**
**1695,-**
Sera lítil, snøgg og bílig telefon, sum bert vigar 135 g. Er tilbúgvin í upp til 100 tímar og hevur upp til 5 tíma talutíð.



PRÍSUR VIÐ MVG
**Siemens S25**
**2895,-**
Hóast telefonin er lítil, hevur hon hópin av eyka hentleikum. Tær tørvar ikki eyka kaðal ella aðrar tvørligar innleggingar – við S25 kanst tú senda og fáa teldupost o.a. við einum infrareyðum interface.



PRÍSUR VIÐ MVG
**Motorola V3688**
**5895,-**
Telefonin hevur hópin av hentleikum, m.a. vibrator, sum ger, at tað ikki er neyðugt at órógva onnur, tá telefonin ringir.

*Fyrivarni verður tikið fyri prentvillum og útseldum vørum.*

petur & petur • 320870

**TELEBÚÐIN**

Tórshavn 31 70 10 • Tvøroyri 37 10 00 • Søldarfjørður 44 10 00
Norðurstreymoy 42 10 00 • Klaksvík 45 74 88 • Sandur 36 10 00 • Miðvágur 33 20 00


# Førleikin at samskipa skal styrkjast

*Mentanarálitið hjá Tórshavnar býráð mælir til, at kommunan stykir sín førleika at skipa fyri tiltøkum sjálv og at samskipa fyri onnur*

John Johannessen

Fyri at tað betur skal bera til at samskipa tiltøk í høvuðsstaðnum, mælir nýggja mentanarálitið hjá Tórshavnar býráð til, at ein samskipari verður settur. Hesin skal leggja til rættis størri býartiltøk og hava um hendi støðugt dagførdan mentanarálmanakka.

Oavalaga á skránni á mentanarálmanakkanum skal eftir hugsanini hjá arbeiðsbólkinum, ið hevur gjørt álitið, vera ein listahátíð. Á hesi listahátíð skulu allar listagreinar í býnum arbeiða saman í felags tiltaki.

Í sambandi við, at samskipari skal setast, hugsar arbeiðsbólkurin sær, at kunningin um Havnina í sama viðfangi verður víðkað út um Kunningarstovuna. Víst verður á, at kunningin um kommununa sum høvuðsstað og heimstað hevur stóran týdning. Tí heldur bólkurin, at tænastan, Kunningarstovan veitir, eigur at verða bygd út í tøttum samstarvi við við býarumsitingina, soleiðis at verkætlanir kunnu leggjast til rættis og fremjast.

Virkast skal eisini fyri, at teir felagsskapir, ið skipa fyri størri árligum tiltøkum, kunnu fáa umsitingarliga hjálp, ið tryggjar, at hetta arbeiðið verður støðugt og framhaldandi.

# After Math í finaluni í kvøld

Føroyski tónleikabólkurin After Math fer í kvøld at luttaka í finaluni í eini tónleikakapping á Amager.

Bólkurin hevur spælt seg ígjøgnum eitt innleiðandi umfar og eina hálvfinalu, og í kvøld skal føroyski bólkurin so standa sína roynd í finaluni.

Finalan veður á spælistaðnum Krunch á Amager, og dyrnar lata upp klokkan 21.00. After Math skulu á pallin klokkan 21.30.

Í bólkinum spæla Malan Eyðunsdóttir, Tróndur B. Hansen, Torkil Olsen, Jógvan Joensen og Petur W. Dalsgaard.

**ek**



# Hart at vera stjóri á Almannastovuni

*Hóast starvið sum stjóri á Almannastovuni er ógvuliga krevjandi og hart, væntar landsstýriskvinnan í almanna- og heilsumálum, at onkur er klárur at taka við avbjóðandi starvinum, tá verandi stjórin fer frá 1. august*

John Johannessen

Stjórin á Almannastovuni, Maria Jacobsen, fer úr starvinum fyrsta august. Orsøkin til, at hon fer úr starvinum er sambært Dimmalætting í gjár ein uppviging av persónligum og starvsligum viðurskiftum.

At stjórin á Almannastovuni sigur fer úr starvi er ikki nakað nýtt fyribrygdi. Hetta er nevnilga fjórðu ferð seinastu seks árini, at Almannastovan skal hava nýggjan stjóra.

Orsøkina til, at stjórarnir eru so ódrúgvir á Almannastovuni, metir Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í almanna- og heilsumálum, vera, at arbeiðið sum leiðari á Almannastovuni hevur verið eitt sera møtumikið starv seinastu árini meðan bygnaðurin er broyttur á stovninum.

**Við at koma undir land**

Helena Dam á Neystabø væntar, at tað um ikki so langa tíð fer at verða munadni lættari at vera stjóri á Almannastovuni, enn tað hevur verið seinastu árini.

Bygnaðarbroytingarnar eru við at koma undir land, og ávísar uppgávur, Almannastovan fyrr hevur røkt verða verða nú gjørdar uttan fyri húsið.

Sum dømi nevnir landsstýriskvinnan, at heimarøktin og dagpeningaskipanin nú liggja uttan fyri Almannastovuna.

Men landsstýriskvinnan í almanna- og heilsumálum ger samstundis greitt, at tað aldri fer at verða lætt at sita í stjórasessinum á Almannastovuni.

– Tað er einki dulsmál, at talan er um eitt ógvuliga tyngjandi og strævi arbeiði. Men eg eri vís í, at fólk við góðara útbúgving ynskja at taka avbjóðingina, tað er at vera stjóri á Almannastovuni, sigur Helena Dam á Neystabø.

Tískil roknar hon við, at starvið verður mannað tá verandi stjórin, sum einans hevur sitið hálvt annað ár, fer frá.

**Óheppi**

Landsstýriskvinnan í almanna- og heilsumálum harmast um, at Almannastovan hevur skift stjóra so ofta seinastu árini. Hetta heldur landstýriskvinnan vera óheppi fyri samanhangin í starvinum.

Men kortini skilir Helena Dam á Neystabø, at stjórarnir ikki hava orkað at sitið so leingi. At øll EDV skipanin í langa tíð hevur verið løgd um og at aðrar bygnaðarbroytingar seinastu árini eru framdar hevur tyngt um arbeiðsbyrðuna hjá stjórunum á Almannastovuni. Kortini vissar landsstýriskvinnan um, at tað skjótt fer at verða betur.

# Mærsk ikki við í oljuleiting við Føroyar

Jan Müller

Danska oljufelagið Mærsk Olie og Gas verður ikki við í komandi oljuleiting á føroyska landgrunninum.

Hetta sigur Bo Wildfang, varastjóri í felagnum við Sosialin.

Avgerðin er tikin eftir:

„eina umfatandi meting av øllum viðurskiftum í sambandi við leiting og møguliga framleiðslu í Føroyum“.

Bo Wildfang sigur víðari, at Mærsk Olie og Gas kortini fer at fylgja útviklinginum í Føroyum sera neyvt. Hetta hevur hann júst boðað stjóranum í Oljumálastýrinum, Herálvi Joensen frá.

Uppá fyrispurning um hetta merkir, at Mærsk ikki metir møguleikarnar fyri at finna olju at vera nóg góðar ella orsøkin eru tær treytir, sum føroyskir myndugleikar hava sett, sigur Bo Wildfang, at tað hava teir onga viðmerking til. Hann vil heldur ikki siga, um hetta merkir, at Mærsk heldur ikki fer at verða við í eini møguligari 2. útbjóðing um nøkur ár.

Mærskstjórin váttar, at eitt annað annað av dótturfeløgunum hjá AP Møller, Danbor Service, heldur fram við sínum fyrireikingum til at byggja upp eina útgerðarstøð í Suðuroynni. Og verða boð eftir Mærsk Contractors, sum er eitt borifelag, so verður støða tikin til tað til ta tíð.

Sosialurin skilur, at sjálvur Mærsk McKinney Møller hevur tikið avgerðina um, at oljuleitingarfelag hansara, Mærsk Olie og Gas ikki skal vera við í oljuleitingini við Føroyar.

-Tað er greitt, at ein so stór avgerð verður tikin á ovasta stað leggur Bo Wildfang aftrat. Hann sigur annars, at Mærsk hevur brúkt nógvar mill. kr. uppá forkanningarnar við Føroyar. Hvussu nógvar vil hann ikki upplýsa.

# Allir uttan Sambandið vilja hava kanning

Jan Müller

Tingmenn úr øllum flokkum uttan Sambandsflokkinum hava skrivað undir áheitan á løgtingsformannin um at seta ein kannngarstjóra at kanna Signar á Brúnni/sjónvarpsmálið.

Kanningarstjórin skal kanna og kortleggja gongdina, sum førdi til, at landsstýrismaðurin í menta- og undirvísingarmálum rindaði Sjónvarpi Føroya 1,6 mió. kr. úr gjaldføri landskassans 23. juli 1999.

Finnbogi Ísakson sigur við Sosialin, at hann nú fer at finna ein kanningarstjóra. Hann skal vera løgfrøðingur og løgtingsformaðurin heldur tað má ber til at finna ein persón, sum stendur púra óheftur í hesum máli, nú vit jú hava hópin av løgfrøðingum.

6 tjóðveldistingmenn, 4 úr Fólkaflokkinum, ein úr Javnaðarflokkinum, ein úr Sjálvstýrisflokkinum og Miðflokkatingmaðurin hava skrivað undir áheitanina.

# Løgreglan á berum í máli um vápnað rán

*Í gjár vóru fýra vikur síðani, at vápnað rán varð framt í einum handli í Havn. Men enn hevur løgreglan onga hóming av, hvør ránsmaðurin er*

John Johannessen

Løgreglan hevur hoyrt nógvan slatur og nógv fólk eru avhoyrd í sambandi við vápnaða ránið, sum fór fram í handlinum hjá P. A. Restorff fyri tveimum vikum síðani. Men kortini hevur kriminalløgreglan onga hóming av, hvør ránsmaðurin er.

Besta sporið, løgreglan higartil hevur fingið, er tá eitt útlendskt ferðafólk, ið gekk framvið P. A. Restorff tá ránið fór fram, leygardagin ringdi til løgregluna og segði seg hava sæð mannin flýggja á einari súkklu omman eftir Grík Kambansgøtu. Men har enda eisini øll spor fyri løgregluna.

Ein súkkla er funnin, ið kann vera súkklan, ránsmaðurin flýggjaði við, men hetta er tó ikki vist. Kriminalløgreglan kannar í løtuni súkkluna.

Av løgreglustøðini í Havn siga tey seg ikki duga at siga, nær komið verður á mál í kanningunum av vápnaða ráninum í P. A. Restorff í Havn.

# Fongslaður fyri neyðtøku

John Johannessen

Kriminalløgreglan hevur sett tveir mans av til at kanna eitt neyðtøkumál, ið fór fram í eini íbúð í Havn triðja páskamorgun. Talan er um ein 19 ára gamlan drong, sum skal hava neyðtikið eina kvinnu um fjøruti ára aldur.

Drongurin varð fyrradagin fyribils fongslaður í fýra vikur, meðan kanningarnar fara fram. Løgreglan sigur, at nógv er at kanna í málinum, men hon væntar at vera liðug við kanningararbeiðið áðrenn ungi maðurin skal fyri rættin 24. mei.


petur & petur • 320870




# Ferðist 2 men gjaldið fyri 1

**Føroyar-Keypmannahavn ella Billund og aftur *)**
Fyri hvønn
**1250,-**
+ ferðaavgjøld
**Børn 2-11 ár: -50%**

**Føroyar-Keypmannahavn-provinsfloghavn og aftur *)**
Fyri hvønn
**1950,-**
+ ferðaavgjøld
**Børn 2-11 ár: -50%**

**Bíligir ferðaseðlar frá Maersk**

Frá 28. apríl til og við 19. juni ber til at ferðast við flogfari millum Føroyar og Danmark, so bíliga sum ongantíð áður. Einastu treytir, at fáa bíligar ferðaseðlar, eru vanligar apex-treytir, umframt at minst tvey vaksin skulu ferðast saman. Hoyr nærri um teir bíligu ferðaseðlarnar frá Maersk Air á tíni ferðaskrivstovu...

**) Ferðaseðlarnir skulu bíleggjast minst 7 dagar frammanundan. Broyting av bílegging kann ikki gerast. Ferðaseðilin kann ikki endurrindast. Ferðatíðarskeiðið skal fara um leygardag og sunnudag. Minst tvey vaksin skulu ferðast saman.*

MAERSK AIR